# Ince gloymdi taktikkin



Paul Ince gjørdi púrt einki burtur úr taktikkinum, tá hann var venjari fyri Blackburn. Tað avdúkar norski spælarin Martin Olsson í samrøðu við Eurosport. - Ince tosaði ongantíð um taktikk áðrenn dystin, og alt var sera leyst hjá honum, sigur Olsson. Úrslitini vóru heldur ikki góð, og Paul Ince varð sekkjaður sum venjari í felagnum. Nýggjur venjari er Sam Allerdyce, og hann tosar nógv um taktikk og er strangari, sigur norski spælarin.

# Royal League næstan á gravarbakka

Lítil vón er fyri, at norðurlendska fótbóltskappingin Royal League verður tikin uppaftur. Kappingin var seinast spæld í 2007, og nú gongur illa at finna ein sjónvarpsstuðul. Stjórin fyri kappingina, Børge Bach, sigur, at um ein avtala ikki verður gjørd við eina sjónvarpsrás innan fýra mánaðir, so gevur hann upp at fáa lív í kappingina aftur.

# Pensionistinum dámar FA-Cup

**Nýggjársaftan fór Sir Alex Ferguson um pensiónsaldurin, men enn tykist hann ikki hava nakrar ætlanir um at taka sær av løttum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Umframt at vera ein sigur á útivølli móti Southampton, har Manchester United ofta hevur staðið seg illa, so var dysturin sunnudagin eisini upp á fleiri mátar ein hugagóð endurminning hjá Sir Alex Ferguson.

Skotin, sum nýggjarsdag fór um tey 67, hevur við mongu sigrum sínum vunnið sær virðing um allan heim, og á Old Trafford hevur hann mest sum legendustatus.

Men tað var nú nær við, at alt steðgaði, áðrenn hann yvir høvur hevði vunnið nakað sum helst.

Tá Ferguson kom til Manchester United frá Aberdeen, sum hann hevði leitt upp á bæði skotsku og europisku tindarnar, setti hann sær fyri at fremja stóra uppruddíng í felagnum. Alt ungdómsarbeiðið í felagnum varð umskipað, og hóast áskoðarunum dámdu menn sum Norman Whiteside, Frank Stapleton og Paul McGrath, so vórðu teir tveittir til hús, tí Ferguson vildi broyta hugburðin í hópinum, har barrvitjanirnar vóru dekan ov títtar.

Einasti limurin í sonevnda drykkjuklubbanum, sum yvirlivdi útreinsanina, var Bryan Robson. Snøgt sagt, tí Ferguson ikki kundi síggja burtur frá framúr leikligu dygdunum, sum távenandi liðskiparin á enska landsliðnum hevði.

Áskoðarunum dámdi einki, at fleiri av teirra yndisspælarunum vórðu ofraðir, og teimum dámdi enn minni byrjanina, sum Manchester United fekk upp á kappingarárið 1989/90. Og tá United í triðja umfarið av FA-Cup í januar mánaði tók ímóti Nottingham Forest, hevði hann veruliga knívin á barkanum.

Hóast tað ongan tíð er váttað, so eru tey flestu samd um, at eitt tap í dystinum hevði sent Ferguson úr venjarastólinum, men eitt mál frá blaðunga Mark Robins bjargaði skotanum.

Og so er restin at kalla søga. Manchester United vann FA-Cup í 1990, Europa Cup fyri steypavinnarar í ’91 og síðani kom veruliga gongd á steypasavningina hjá Alex Ferguson, sum higar til hevur vunnið ikki færri enn 30 steyp við felagnum.

# Inniróðurkapping avlýst

**Fyrireikingarnar hava ikki verið nóg góðar, og nú er stóra Scandinavian Open kappingin í inniróðri avlýst**

INNIRÓÐUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Á heimasíðuni hjá Knørri, www.kr.fo, sigur formaðurin í róðrarsambandinum, Jan Herman Hansen, at hann harmast støðuna almikið, men at hann í løtuni ikki sær aðrar vegir enn at avlýsa kappingina. Og hann staðfestir, at tað neyvan gagnar umdøminum hjá Føroyum í norðurlendskum kappróðrarhøpi, at kappingin verður avlýst, nú Føroyar skuldu standa sum vertir fyri hesari.

- RSF og Miðvágs róðrarfelag hava fyrr staðið fyri úttøkukappingum til Scandinavian Open Indoor, seinast í fjør, men hesa ferð hevur samstarvið onkursvegna ikki borið á mál. Tess vegna er kappingin nú avlýst, sigur Jan Hermann Hansen við heimasíðuna hjá Knørri.

## Hondbóltur

### Atlantic Airways-kappingin

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 10 | 8 | - | 0 | - | 2 | 275 | 253 | 22 | 16 |
| 2 Neistin | 10 | 7 | - | 0 | - | 3 | 304 | 287 | 17 | 14 |
| 3 H71 | 10 | 6 | - | 0 | - | 4 | 266 | 237 | 29 | 12 |
| 4 StÍF | 10 | 4 | - | 2 | - | 4 | 245 | 244 | 1 | 10 |
| 5 Kyndil | 10 | 2 | - | 2 | - | 6 | 246 | 274 | -28 | 6 |
| 6 KÍF | 10 | 1 | - | 0 | - | 9 | 238 | 279 | -41 | 2 |

